# Vælgagnist

**Hotel Føroyar skipar aftur í ár fyri sonevndu føroysku borðunum, har borðreitt verður eitt kvøld við føroyskum mati burturav. Tiltakið byrjaði mánakvøldið, og undirtøkan var góð**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*





Føroyskur matur er væl umtóktur milum ferðafólkið, sum kemur hendanveg. Tað vita tey á Hotel Føroyum og fara í ár at skipa fyri føroyskum kvøldum tvær ferðir um vikuna í mun til einaferð í fjør. Borðreitt verður við føroyuskum burturav mánakvøld og mikukvøld í summar. Tiltakið verður millum klokkan 18.00 og 22.00 hesi kvøldini.

Mánakvøldið varð fyrsta borðhaldið av hesum slagnum í summar hildið fyri fullsettari Glasstovu á Hotel Føroyum. Mest var talan um útlendsk ferðafólk, sum búðu á hotellinum. Men onkur føroyingur var ímillum, Treyðugt so. Og tað skal ikki skiljast soleiðis, at tað ikki er loyvt føroyingum at royna hesi frálíku tilboðini, borðið hevur at bjóða, sigur Birna Jacobsen, sølustjóri á Hotel Føroyum.

Borðini mestsum bognaðu av mati. Tilgjørdum á ymsan hátt. Bæði traditionelt føroyskum, so sum kókað knettir, turr grind við kókaðum eplum eins og fiskasalat og rækjurættir. Nógv og gott og vónleyst at royna allar rættirnar.

Til at siga útlendingum frá, hvat hetta ymiska nú var, sum lá á borðinum, vóru skelti sett við hvønn einstakan rætt.

Men kortini tóktist, sum fólk høvdu hug at ivast eitt sindur, tá tey komu framat. Tí eitt nú var eingin, sum segði teimum, at spikið, sum lá í einum ílati, vanliga verður etið saman við tvøstinum, sum lá við síðuna av, ella turra fiskinum, sum lá hinumegin og ikki saman við seyðarhøvdinum ella skinsakjøtinum, sum forrestin smakkaði heilt væl.

Vanligt er við slík høvi, at eisini annað enn føroyskur matur verður sýndt fram. Soleiðis var eisini á Hotel Føroyum hetta kvøldið.

Klædnapløgg frá Guðrun og Guðrun vóru at síggja í matstovuni. Og sum leið út á kvøldið komu dansarar frá Tøkum Lætt at sýna fremmandafólkinum føroyskan dans. Bæði »vanligan« dans og dansispøl. Og sum vanligt plagar at vera, sluppu gestirnir eisini uppí, áðrenn endað varð.

# Altjóða mentanir hittast á sama staði

**Um vikuskiftið verður eitt stórt altjóða tiltak í Havn, har umboð fyri ymiskar heimspartar hittast til stevnu. Gongur sum ætlað verður ein felagsskapur fyri altjóða mentan stovnaður**

ALTJÓÐA MENTAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin*

**Havn:** Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyingar hava møguleika at fáa kunnleika um fremmanda mentan á heimvølli.

Og tað er so als ikki gerandiskostur, at ein við sama høvi kann fáa innlit í mentan og siðir úr so ymiskum støðum sum Japan, USA og Afrika samstundis. Tað er tó júst hetta sum stendur ovast á breddanum komandi vikuskifti í Læraraskúlanum í Havn.

Meðan summi fara á norðoyastevnu, til landsdyst ella arbeiða í urtagarðinum, so fara í hópatali av øðrum á ein altjóða mentanardag á Læraraskúlanum.

Á skránni er tónleikur, dansur, framsýningar, matur og ein rúgva av øðrum tiltøkum, har hvørt landið sær fær møguleika at seta sín dám á henda fyrsta dagin av slíkum slagi í Føroyum.

## Handaligt arbeiði

Stóra mentanartiltakið er so umfatandi at neyðugt hevur verið at brúka tveir dagar til tað, soleiðis at øll londini kunnu sleppa framat fyri at vísa nakað av tí, sum sermerkir teirra land.

Tiltakið byrjar fríggjakvøldið við umboð úr fimm londum fara at vísa ymiskt fram úr teirra landi. Hesi umboða Ongland, Noreg, Japan, Afrika og Latínamerika.

Leygardagurin er kortini tann dagurin, tá mest er á skránni. Umframt allar framførslurnar verður somuleiðis høvið hjá fólki at royna mat úr hesum londum.

Henda seinna dagin í tiltakinum verða tað umboð fyri Føroyar, russland, Thailand, Japan, USA, Noreg, Afrika, Ongland og Latínamerika sum luttaka. Her verður eisini høvið at hitta hesi fólkini á máli og tosa um teirra land, eins og møguligt er at síggja ymiskt handaligt arbeiði úr teirra heimlandi.

## Felagsskap

Eitt slíkt tiltak sum hetta kostar sjálvandi pening, og tí hava tey selt atgongumerki til hesi tiltøkini. Og sum vanligt er, eru tey bíligari at keypa áðrenn tiltakið enn við dyrnar.

Ætlanin við tiltakinum er í fyrsta umfari at vísa fram nakað av tí, sum sermerkir hesi ymisku londini.

Hinvegin er ætlanin somuleiðis, at tiltakið skal føra við sær eina stovnan av einum felagsskapi fyri altjóða mentan í Føroyum.

So er bert eftir at vóna, at hetta tiltakið eydnast so mikið væl, at tað kann verða endurtikið eina aðru ferð.



*Trummudansur, framførslur og mentanir úr ymsum londum hittast á Læraraskúlanum um vikuskiftið, tá altjóða mentan er á skránni*